# Løgtingsmenninir talaðu at

**MÁL Í MIÐLUM – Eg veit tað ikki við vissu, men tað tykist sum duga fjølmiðlafólk ikki at nýta allar hentleikar, sum nú eru tøkir at læra seg gott mál. Tað sigur Ívar Iversen, sum minnist, at løgtingsmenn talaðu at, um hann ikki brúkti rættan málburð sum útvarpsmaður**

Uni Holm Johannesen




*– Eg skal ikki siga, at orsøkin er beinleiðis líkasæla. Men fjølmiðlafólkini duga serliga illa at benda, og tey brúka stundum skeivar fyrisetingar, sigur Ívar Iversen*

Ívar Iversen tekur undir við Annfinni í Skála.

– Nei, føroysk fjølmiðlafólk vanda sær ikki serliga væl um málið, sigur maðurin við eyðkendu og týðiligu røddini, sum í fleiri áratíggju las tíðindini í Útvarpi Føroya.

Annfinnur í Skála hugleiðir í grein á heimasíðuni hjá Sprotanum um málburðin hjá føroysku fjølmiðlafólkum. Hann er ikki bergtikin:

»Nú hava vit nógvar og alsamt vaksandi tal av bókum á føroyskum, vit hava tríggjar útvarpsræsur, og um stutta tíð hava vit kanska eisini tvær sjónvarpsræsur. Harumframt hava vit tvey rættiliga stór bløð, men synd hevði verið at sagt, at nøkur málmenning er farin fram, heldur tvørturímóti. Dastið av fjølmiðlafólkum okkara ger sær lítlan ómak, tá ið tað snýr seg um at skriva ella tosa føroyskt. Hendan líkasæla føroyska málinum viðvíkjandi, er vorðin eitt mígandi hart rák, sum, eg, ið hvussu er, haldi, fer at fáa óhepnar, ja syrgiligar málsligar avleiðingar,« skrivar Annfinnur í Skála.

Ívar Iversen er málvinur sum fáur. Hann hevur tænt føroyska málinum ómetaliga væl í fleiri enn 50 ár. Sum fjølmiðlamaður dugdi hann væl at taka til.

Ívar Iversen heldur, at fjølmiðlarnir leggja ikki so stóran dent á at málbera seg rætt.

– Eg skal ikki siga, at orsøkin er beinleiðis líkasæla. Men fjølmiðlafólkini duga serliga illa at benda, og tey brúka stundum skeivar fyrisetingar, sigur Ívar Iversen.

## Løgtingsfólk talaðu at

Útvarp Føroya fór at senda í 1957. Tá byrjaði somuleiðis eitt nýtt tíðarskeið í føroyska fjølmiðlaheiminum. Beinan vegin varð gjørt av, at alt tilfarið skuldi vera á føroyskum.

Og nógv varð lurtað eftir útvarpinum. Tað gav føroyska málinum munandi betri møguleikar at menna seg, tí nú slapp tú fyri fyrstu ferð at hoyra tíðindi á føroyskum.

Tað vistu Ívar Iversen og hinir, sum starvaðust í Útvarpinum. Tað var mangan, at løgtingsfólk ringdu til útvarpsmenninir og gjørdu vart við, at málsliga var ymiskt komið skeivt skeivt.

– Vit vóru nærlagdir við føroyska málinum, tí annars vóru vit flongdir, skemtar hann, og leggur dent á týdningin, sum málburðurin hevur í føroysku loftmiðlunum.

– Tað er serliga í Útvarpinum og Sjónvarpinum, at fjølmiðlafólkini mugu gera sær ómak. Fólk hugsa meira um málburðin, tey hoyra í loftmiðlunum, enn skrivaða málið í bløðunum. Tað setur seg onkursvegna fastari í minnið, sigur Ívar Iversen.

Hann byrjaði í Útvarpinum í 1960 og fór frá fyri aldur í 1998.

## Tøknin eingin umbering

Tíðindi á føroyskum verða varpað út sum ongantíð áður.

Í útvarpi, sjónvarpi, bløðum og á alnetinum er tað nýggjasta til taks so at siga allan dagin.

Fjølmiðlafólkini eru undir støðugum trýsti fyri at fáa alt út. Men tað er eingin umbering fyri málburðin, heldur Ívar Iversen.

– Tað eigur ikki at ávirka málburðin, tí tú hugsar og skrivar á føroyskum. Tú verður heldur ikki kønur í føroyskum máli eftir einum degi. Menningin stendur við alt lívið, sigur Ívar Iversen, sum leggur doyin á, at øll heimsins mál broytast við tíðini.

Hann vísir eisini á, at møguleikanir hjá fjølmiðlunum eru betri í dag. Orðabøkur vóru ongar at hella seg til fyrr, og tí noyddist tú at ringja og spyrja teir málkønu, um tú ivaðist í onkrum.

– Uttan at vita tað við vissu, so tykist tað sum, at fjølmiðlafólk duga ov illa at nýta allar teir hentleikar, sum nú eru til taks at læra seg gott mál, sigur Ívar Iversen.

# Ávirka fólk skeiva vegin

Svenning Tausen hevur í nógv ár havt stóran áhuga fyri, hvussu føroysk fjølmiðlafólk orða seg í skrift og talu. Hann segði í viðtalu við Dimmalætting fríggjadagin tann 3. august í 2007, at føroysk tíðindafólk duga ov illa føroyskt mál, og at tey ótilvitað hava ringa ávirkan á málburðin hjá vanliga føroynginum.

– Eg meti, at føroyingar duga eins væl sítt móðurmál, sum fyri 20-30 árum síðan. Men tað kann ikki dyljast, at Kringvarp Føroya og bløðini ávirka fólk tann skeiva vegin. Tað hevur Útvarp Føroya gjørt hesi fimmti árini, tað hevur verið, og nógv verri, síðan Niels Juul Arge fór frá sum útvarpsstjóri. Eg veit, at Niels Juel Arge og Ívar Iversen gjørdu nógv burturúr at vegleiða útvarpsfólk. Fjølmiðlafólk mugu læra seg at brúka orðabók, segði hann við blaðið.

# Stórur saknur í teimum málkønu

Brot úr hugleiðingunum hjá Annfinni í Skála í grein á heimasíðuni hjá Sprotanum:

»Lat meg siga eitt fyrst, fólk halda, at føroyskt ikki kann nýtast í øllum lutum, at tað er ov fátækt, tungt og tvørligt, og at ikki ber til at festa á blað alt tað, sum er neyðugt í nútíðar samfelagi. Tað er í roynd og veru ikki rætt, tí tað, ið er stóra problemið føroyskum viðvíkjandi, er, at vit snøgt sagt ikki duga føroyskt nóg væl. Frálæran í føroyskum er við øðrum orðum ikki nóg holl, og vit verða so sanniliga heldur ikki stuðlað til at duga føroyskt, tá ið vit lesa tað, ið skrivað verður á føroyskum, tí skrivandi fólk gera sær ongan ómak. Her hugsi eg serstakliga um fjølmiðlafólk okkara. Hvar eru Ívar, Niels Juel, Oskar, Axel og Jóhann Hendrik nú? Stórar saknur er í teimum.«




*Annfinnur í Skála sigur, at saknur er í Ívari Iversen og øðrum í føroyskum fjølmiðlunum*